# Meðan vit bíða eftir betri

ÓLAVSØKUKONSERTIN 2004



Sangarin í Fluffy Toys, Einar Jacobsen

**Tað gekk ikki upp í eina hægri eind í Kommunskúlagarðinum. Ársins ólavsøkukonsert fer í minnið sum ein hin ringasta seinnu árini**

UMMÆLI
*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Ein kókandi áhoyrarafjøld av ungum fólki skrála eftir Páll Finni Páll.

- Lær at siga noy, tá menn vilja pula tær, syngja tey av lívsins kreftum.

Forsangarin í Páll Finni Páll segði herfyri, at teir ikki longur tímdu at syngja um pissilingar. Men tað tíma teir so øgiliga væl. Tað er væl tað, bólkurin ger mest av - at syngja fúlt - og kanska eisini er best til. Vit eru miðskeiðis í skránni á ársins ólavsøkukonsert. Dagurin eitur ikki longur 27., og tjóðarhátíðin verður sum vant skotin avstað við fullari ferð í Kommunuskúlagarðinum. Teir fúlu dreingirnir í Páll Finni Páll hava jóladagar á pallinum. Og tað er ikki sørt, at áhoyrarnir hava hug at syngja við. Orsøkin til, at vit velja at dvølja eina løtu við hesar ungu menn er ikki tí teir spældu so øgiliga væl - langtfrá tí. Men tí teir vóru hæddarpunktið á konsertini. Teir vóru einasti bólkur, ið skapti nakað burturúr ongum fólki. Headache Blues Treo var eftir mínum tykki besti bólkurin, og Týr skuffaði heldur ikki millum manna. Tað var sjáldan, at Kommunuskúlagarðurin livdi við tónleikinum. Satt at siga var ólavsøkukonsertin ikki nógv at skriva heim um.

Tað gekk ikki væl í hond. Konsertin gjørdist ongantíð tað stóra upplivilsið. Hon hekk illa saman. Har vantaði megi

Í ítrótti verður sagt, at tabellin lýgur ikki. Og lógvabrestir eins snjallir sum í kirkju úr einum útholaðum Kommunuskúlagarði fyri síðsta bólkinum, siga alt. Tað var ikki, sum tað plagar og kanska eigur at vera.

## Blandað bomm

Konsertin er heilar átta tímar drúgv. Tað munnu vera fá, sum hava fingið alla konsertina við. Tólv bólkar er nógv - ov nógv í hesum førinum. Ein samanhangandi var ikki at finna. Eingin bólkur í ár var á støði við eitt Frændur, tá tað kemur til at selja atgongumerki og at savna fólk. Men saknur var eisini á einum bólki sum All That Rain, sum høvdu kunnað givið hesari konsertini eitt nógv tiltrongt spark. Men aftur til teir bólkar, sum vóru við.

Hóast teir spældu fyri fáum fólkum vóru Headache Blues Treo í mínari verð outstanding. Teirra tónleikur sveimaði í lýggju summarluftini.

Stuttligt var at hoyra bólkin Paradox, ið er mannaður við ungum evnaríkum tónleikarum. Men í ung og evnarík sjangruni var tað Kristel Lisberg, sum vann við fleiri longdum. Hennara útstráling og rødd fluttu fjøll. Kristel Lisberg er bert fimtan ára gomul. Umgyrd av nøkrum royndum gubbum í føroyska tónleikaheiminum stóð á fyrsta sinni á pallinum. Hon er bara fimtan ár, so vit halda okkum til at undrast á, at ein so ung kann klára seg so væl. Hennara skrá vóru sokallaði kopiløg av nýggjari og eldri slag. Skráin kundi verið betri, men framtíðin og røddin er bæði ljós og fjøllbroytt.





Tað var ikki eiðasørt, at fólk hugnaðu sær á konsertini.

Sum kvøldið leið legðist meiri fólk til, men tey nógvu steðgaðu ikki leingi. Tað eydnaðist ikki at fáa fólk at støðast leingi, og tað setti sín dapra dám á.



Íðnu tónleikararnir hjá I Am góvu seg fult út á pallinum



Tólv bólkar vísti seg at vera ov nógv. Tað gjørdist nakað langt millum snapsarnar av pallinum

## Amin týsdagin

Vegna framskundað evstamark bar ikki til at fáa ummæli av framførsluni hjá Amin Jensen við í blaðið í dag. Ístaðin verður tað prentað týsdagin.

Ógvuliga ymiskt var, hvussu tað ljóðaði av pallinum. Eitt nú Hatespeech tóktist at vera ov hart fyri ljóðuppsetingina.

Tá Gunnar Mikkelsen Band fór á pallin sum ein av teimum síðstu, og eftir okkara tykki skeiva tíðspunkti, var tað sum um, at onkur fann og tendraði kontaktina. Hesin framúr evnaríki hálvi føroyingurin var kanska navnið hesaferð. Við nøkrum góðum føroyskum tónleikarum afturat sær fótaði hann sær ikki so væl á føroyskum, men tónleikurin var rætt og slætt framúr.

Gestir eru byrjaðir at spæla alment aftur. Teir góvu seg fult út, men tykjast eitt fitti petti frá tí ljóði, sum fekk øll at rakna við á Prix Føroyum.

Makrel, sum fyri stuttum góvu eina nýggja fløgu út, endaðu konsertina. Tað var kanska ikki so nógv at gera hjá teimum, tá ið áhugin fyri konsertini týðuliga var fokin. Tað var fyri so at siga allar bólkar, at vit kunnu siga næstan ella líkavið. Áhoyrarnir fingu ikki heildina. Og hjá ongum gekk tað upp í eina hægri eind við tónleiki og fjøldini.

Blandaðu bommini riggaðu ikki so væl í sama posa.

## Dirty dusin

Í ummælinum av ólavsøkukonsertini í fjør var dúgliga stungið eftir fyrireikarunum fyri at seta ein óhóskandi blanding av føroyskum og útlendskum út í kortið. Ilt var at fáa eyga á ein samleika. Men í ár var greitt meldað út: Tólv føroyskir bólkar. Heilt einfalt ein stórur partur av teimum góðu føroysku bólkunum. Einki "stórt" navn, sum eitt nú Frændur ella Terji og Føstufressar.

Hetta er ein samleiki, vit kunnu taka undir við. Men tólv bólkar er nógv, rættiliga nógv.

Tað skal síggjast í ljósinum av, at ólavsøkukonsertin hevur lagt seg í eina rímiliga fasta legu og hevur stórar ambitiónir, at vit hætta okkum at finnast at. Vit bíða - hini skapa.

## Hálvan veg

Ólavsøkukonsertin er nógv broytt seinnu árini. Ì ár var konsertin fyrst og fremst markerað við einum nýggjari ljóðútgerð. Endamálið er at gera pallin á ólavsøkukonsertini til eitt upplivilsi fyri tónleikararnar. Trupulleikin í ár var, at konsertin ikki var eitt gott upplivilsi fyri vanligu áhoyararnar. Sjálvandi eigur ólavsøkukonsertin at mennast, men tað er drúgt at koma niðaná. Tað tekur tíð at byggja tílíkt upp, og vit bíða spent eftir betri. Í ár var mestur trupult at síggja skógin fyri berum trøum.